# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Hondbóltur í kvøld

*Í kvøld hava bæði StÍF og Neistin møguleika at minka um fjarstøðuna upp til oddaliðið úr Vestmanna*

JÁKUP MØRK

Tveir dystir verða leiktir í bestu mansdeildini í kvøld, tá StÍF og Neistin, sum eru ávíkavist nummar tvey og trý á stigatalvuni, skulu royna seg móti teimum báðum niðastu liðunum.

**Tveir greiðir favorittar**
Eftir ætlan skuldi dysturin millum Tjaldur og StÍF spælast fyri viku síðani, men hetta var av ongum, tá klokkan í høllini ikki vildi rigga.

Eftir skipanini áttu bæði liðini at hava frí í kvøld, og sostatt lá væl fyri at gera dystin av sær longu nú.

Einki er at ivast í, at tað eru strandingar, sum eru favoritar at vinna dystin. Verandi føroyameistararnir eru enn partur av gullstríðnum, og skulu teir framhaldandi vera tað, er kravið ein sigur í kvøld.

Neistin skal eins og StÍF royna seg móti einum botnliðið, og her er heldur einki at ivast í, at Neistin er favorittur undan dystinum. Hoyvíkingar hava ikki gjørt tær stóru skreytirnar hetta kappingarárið, og ikki er tað væntandi, at teir á nakran hátt kunnu skala neistaliðnum.

Einasta ivamálið hjá Neistanum hevur verið, um Heini Joensen fór at verða førur fyri at spæla. Í fyrsta landsdystinum um vikuskiftið meiddi hann sær høgra arm, men kortini fekk hann spælt við bæði leygar- og sunnudagin, so í Neistanum rokna tey við, at hann er til reiðar at spæla í kvøld.

**Munurin minkar**
Vinna tey bæði oddaliðini sínar dystir, soleiðis sum væntandi er, gerst enn tættari millum ovastu støddu liðini á stigatalvuni.

Vestmenningar eru í løtuni tvey stig framman fyri Neistan og trý stig framman fyri StÍF, men hinvegin hevur VÍF leikt tveir dystir fleiri enn hini bæði. Vestmenningar verða tó helst framhaldandi á odda eftir dystirnar í kvøld, tí hóast Neistin skuldi vunnið, og har við komið ájavnt VÍF í stigum, so hevur VÍF í løtuni ein málmun, sum er góð 50 mál betri enn Neistin. Ein málmunur, sum í seinasta enda kann vísa seg at verða gull verdur.

### Støðan undan dystunum í kvøld

**1. deild, menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 7 - 0 - 2 | 610 | 472 | 138 | 25 |
| 2 Neistin | 7 | 7 - 0 - 0 | 558 | 473 | 85 | 23 |
| 3 StÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 548 | 472 | 76 | 21 |
| 4 Kyndil | 8 | 5 - 0 - 3 | 562 | 489 | 73 | 17 |
| 5 KÍF | 9 | 3 - 0 - 6 | 468 | 595 | -127 | 7 |
| 6 H71 | 8 | 1 - 0 - 7 | 464 | 568 | -104 | 4 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 - 0 - 8 | 483 | 624 | -141 | 3 |

**1. deild, kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 7 - 0 - 0 | 493 | 383 | 110 | 23 |
| 2 VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 398 | 356 | 42 | 15 |
| 3 Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 363 | 359 | 4 | 15 |
| 4 Kyndil | 7 | 3 - 0 - 4 | 398 | 359 | 39 | 13 |
| 5 VB | 7 | 1 - 0 - 6 | 424 | 452 | -28 | 6 |
| 6 Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 285 | 452 | -167 | 0 |

# H71 vann triðju deild

*Kappingin í triðju deild er nú av, og gjørdust tað hoyvíkingar, sum at enda drógu longsta stráið*

JÁKUP MØRK

Flestum kunnugt hevur ikki gingist nakað serligt hjá besta mansliðnum hjá H71 hetta kappingarárið.

Hetta er tó ikki einasta lið, sum H71 hevur við í kappingini, og fyri stuttum eydnaðist tað triðjudeildarliði felagsins at tryggjað sær fyrsta plássið í kappingini.

Sum tað framgongur av myndini við síðuna av, so eru fleiri væl kendir hondbóltsleikarar á hesum liði, og at dugur framvegis er í teimum, er lítið at ivast í.

M.a. megnaðu teir at geva Kyndli ein hvøkk, tá liðini bæðis hittust í steypakappingini fyrr í ár. Sum kunnugt eydnaðist tað tó Kyndli at tryggja sær víðari luttøku í kappingini.

Sosialurin ynskir hoyvíkingum hjartaliga tillukku við fyrsta plássinum.



***Vinnarar av triðju deild, H71***
*Standandi frá vinstru: Árni Thomassen, Jákup Símun Simonsen, Hallur Danielsen, Jógvan Elias W. Poulsen, Høgni Hoydal og Svend Poulsen*
*Húkandi frá vinstru: Árni Ellefsen, Jarvin Feilberg Hansen , Andrass Poulsen, Egin Høgnesen, Kristian Martin Skála við soninum, Kára og Petur S. Dahl.*
*Óli Samróð væntar á myndini*

**ÍtróttaSosialurin kann sjálvandi eisini lesast á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# Steypakappingin

*Um vikuskiftið varð seinasta umfarið í steypakappingini hjá yngru deildunum leikt í Havn*

JÁKUP MØRK

Nú hondbóltsárið er farið at halla, er tíðin komin, har Føroyameistarar og steypavinnarar skulu finnast í ymsu deildunum.

Steypakappingin hjá yngru deildunum hevur verið skipað á tann hátt, at fleiri kappingar hava verið ígjøgnum árið. Í hesum kappingum hava liðini fingið tillutað stig, alt eftir, hvørja endastøðu tey hava fingið í kappingini. Í finaluumfarinum, sum nú varð leikt í Havn, luttóku so tey fýra liðini, sum gjøgnum árið høvdu fingið flestu stigini.

Her varð leikt eftir sonevndu cup-skipanini, soleiðis at tvær hálvfinalur vórðu leiktar, áðrenn endað varð dystinum um bronsumerkini og sjálvandi finaluni.

**Gentur 12 ár**
Her eydnaðist tað liðinum hjá Neistanum at vinna kappingina, eftir at tær í finaludystinum vunnu 14-5 á Stíf. Í hálvfinalunum vunnu tey á ávíkavíst Kyndil og VÍF, sum sostatt hittust í dystinum um triðja plássið, har tað eydnaðist VÍF at vinna 5-3.

**Dreingir 12 ár**
Her stóðu hálvfinalurnar millum ávíkavist Neistan-StÍF og H71-Kyndil. Úrslitini lagaðu seg soleiðis, at Neistin og Kyndil komu í finaluna, og her gjørdist talan um ein sera spennandi dyst. Tá upprunaligi dysturin varð leiktur, stóð á jøvnum 6-6, men aftan á umdyst eydnaðist tað Kyndli at tryggja sær sigurin. Í dystinum um triðja plássið vunnu hoyvíkingar 9-6 á strandingum.

**Gentur 14 ár**
Her vóru liðini í finalubólkinum Neistin, StÍF, VÍF og Kyndil. Meðan Neistin vann trygt í síni hálvfinalu, skuldi umdystur til, áðrenn tað eydnaðist Kyndli at basa VÍF í síni hálvfinalu. Í finaludystinum vann Neistin aftur trygt á Kyndli, meðan tað var sera javnt í bronsudystinum, har tað loksins eydnaðist VÍF at vinna 7-6 á StÍF.

**Dreingir 14 ár**
Í fyrru hálvfinaluni í hesum bólkinum vunnu Strandingar 7-5 á Neistanum, eftir at tað hevði staðið á jøvnum 4-4, tá upprunaliga leiktíðin var liðin. Í hinari hálvfinaluni Vunnu Kollfirðingar 6-2 á Kyndli, og sostatt skuldu StÍF og KÍF hittast í finaludystinum. Her vórðu tað kollfirðingar, sum drógu longra stráðið, eftir at teir í einum spennandi dysti vunnu 13-11 á mótstøðuliðnum. Í dystinum um triðja plássið vann Kyndil 9-8 á Neistanum.

**Gentur 16 ár**
Onnur hálvfinalan stóð millum VÍF og Kyndil, og her eydnaðist tað vestmannagentunum at vinna 8-3, og sostatt tryggja sær finalusessin. Í hinari hálvfinaluni hittust a- og b-liðið hjá Neistanum, og her eydnaðist tað b-liðnum at vinna 7-5. Í finaluni vórðu vestmannagenturnar tær drúgvaru, og eydnaðist tað teimum at vinna dystin 14-9. Dysturin um triðja plássið stóð sostatt millum Neistan a og Kyndil, og her vann Kyndil 10-6.

**Dreingir 16**
Her var talan um tvær sera javnar hálvfinalur, men at enda gjørdust tað a- og b-liðið hjá Neistanum, sum tryggjaðu sær finalusessirnar, við at vinna á ávíkavist StÍF og Kyndli í hálvfinalunum. Í finaludystinum vann a-liðið hjá Neistanum 16-11 á b-liðnum, sum sostatt mátti taka til takkar við silvurmerkjunum. StÍF tryggjaði sær bronsumerkini, tá teir í einum málríkum dysti vunnu 18-16 á Kyndli

Á komandi síðunum eru myndir av øllum liðunum, sum luttóku í finaluumfarinum, og vilja vit nýta høvið til at ynskja øllum vinnarunum hjartaliga tillukku við steypasigrinum.





*Hjá gentum 12 gjørdist Neistin vinnar*



*Vinnarar av dreingir 12, Kyndil*



*Nr. 2 gjørdist StÍF*



*Nr. 2, Neistin*



*VÍF varð nr. 3*



*H71 gjørdist nr. 3*



*Og Kyndil var nr. 4*



*Og StÍF varð nr. 4*